UPPLIVINGAR ÚR GERANDISDEGNUM
FRÁ 1907 TIL DAGIN Í DAG

# JÁKUP ANDREAS HEVUR FYLGT LJÓSINUM

**PORTRETT: 77 ára gamli Jákup Andreas Arge av Argjum er millum størstu privatu veitarar av filmstilfar til Føroyskar Søgur. Saman við Niels L. Arge, Dánjal Jákupi Mortensen og danska læknanum Knud Goll má Jákup Andreas Arge roknast sum ein av undangongumonnunum innan filmslist í Føroyum**

– So pápi tín er av Nesi. Nes og Toftir hava ein framúrskarandi sólargang – ein tann besta í landinum, staðfestir Jákup Andreas Arge, meðan hann fer á føtur og gongur yvir til køksgluggan í húsinum á Heiðatúni á Argjum og hyggur inn á Nes. Tað er eyðsæð, at her hevur Jákup Andreas mangan staðið og eygleitt sólargangin og notið framúrskarandi útsýnið.

Ljósið upptekur 77 ára gamla Jákup Andreas Arge, ið er fyrrverandi ursmiður. Hann tosar nógv um tað, tí tað hevur fylt nógv í hansara tilveru. Tað ber til at siga, at Jákup Andreas hevur fylgt ljósinum. Stóra ítrív hansara hevur verið at taka myndir – deyðar eins væl og livandi. Seinastu 30 árini hava føroyingar dag og dagliga tilvitað ella ótilvitað hugt at myndunum hjá Jákup Andreasi, tí beint fyri ólavsøku góvu hann og konan, Solveig, tað, ið skuldi vera 30. og síðsta útgávan av víðagitna Føroya Myndaklendara við føroyskum bygda- og náttúrumyndum út. Kalendarin hevur prýtt bróstið í køkinum í flest øllum føroyskum heimum eitt ella annað tíðspunkt, síðan hann fyrstu ferð varð útgivin í 1979. Tað er ikki tann blettur av oyggjunum, ið Jákup Andreas ikki hevur avmyndað, og hann viðgongur, at tað er vorðið torført at finna nýggj myndevni.

### Góða konu og gott ítriv

– Uppskriftin upp á eitt gott lív er at hava eina góða konu og eitt gott ítrív, staðfestir Jákup Andreas og hyggur brosandi yvir á konuna Solveig, ið hevur verið hansara trúgvi fylgisveinur gjøgnum lívið.

– Tað kann væl vera, at myndatøkan hevur gingið undir at vera eitt ítriv, men hon tók rættiliga nógva tíð frá tínum dagliga yrki sum ursmiður. Eg minnist, at pápi Jákup Andreas [Skilling, blaðm.], plagdi at rista við høvdinum og siga, at hetta gongur galið hetta her, svarar Solveig argandi, meðan hon hyggur blídliga upp á mannin.

Umframt sín stóra áhuga fyri myndatøku er Jákup Andreas Arge eisini ein av undangongumonnunum innan filmslist í Føroyum og millum størstu privatu veitarar av filmum til verkætlanina »Føroyskar Søgur«. Jákup Andreas gjørdi nógv við at dokumentera bæði samtíðina og gamlar siðvenjur í 50unum og 60unum við sínum 16 mm filmsupptøkutóli. Bæði einsamallur og saman við filmsvinmonnunum Dánjal Jákupi Mortensen og danska læknanum Knud Goll hevur Jákup Andreas gjørt heilar dokumentarfilmar um eitt nú korn- og torvskurð í Húsavík, ræning í Trøllhøvda og ein sera umfatandi film um gerandisdagin í Føroyum síðst í 60unum, ið fekk heitið »Føroyar í dag«. Hesin filmur varð vístur í SvF á ólavsøku fyri nøkrum árum síðan.

### Tað hevur ligið í mær

Tað var av tilvild, at Jákup Andreas, sum er føddur í 1931, einans 11 ára gamal fekk áhuga fyri at taka myndir.

– Undir krígnum búðu vit eitt skifti í Villumsgøtu. Hetta var í 1940 ella 1941. Beint hinumegin vegin hildu eingilskmenninir til. Har var kantina og nógvar barakkir – eg minnist ikki, hvussu nógvar barakkirnar vóru, men tær vóru nógvar. Ein kona búði í kjallaranum hjá okkum, og har komu nógvir eingilskmenn inn á gólvið. Teir høvdu brennivín við sær, so tað bleiv ein forferdiligur hurlivasi, greiðir Jákup Andreas frá, meðan eitt skálkabros breiðir seg um andlitið.

Endin varð, at konan, ið leigaði í kjallaranum, mátti flyta.

– Eg veit ikki, um hon bleiv uppsøgd, men hon flutti í skundi við tí úrsliti, at tað lá ein rúgva av tingum eftir. Tá alt skuldi ruddast, lá eitt sovorðið myndatól millum tingini, og tað fekk eg. Síðan fór eg oman í bókhandilin og spurdi, um tey kundu seta mær ein film í tólið, og tað var gaman í. Eg fór so út og tók myndir av øðrum børnum í grannalagnum og so omanaftur í bókhandilin at spyrja, um tey kundu framkalla filmin fyri meg. Myndirnar blivu so óalmindiliga góðar, og tá tendraði eg av álvara upp á hetta her við at taka myndir, greiðir Jákup Andreas frá.

Hóast hann einans var ein piltur, skuldi tað vísa seg, at hesin eldhugi fyri myndatøku fór at loga fyri lívið. Sjálvt tann dag í dag fer Jákup Andreas ikki út um dyrnar uttan eitt myndatól.

– Hann er altíð sannførdur um, at hann fer at renna seg inn í eitt gott motiv. Um hann hevur gloymt myndatólið eftir, so kemur hann aftur eftir tí, sigur Solveig.

### Skapanargleðin var drívmegin

Tað var eisini av tilvild, at Jákup Andreas síðst í 1950unum fór undir at taka upp film.

– Thomas Krog, ið var múrarmeistari í Havn, átti ein upptakara, ið hekk á vegginum, og tá eg kom inn á gólvið hjá honum, spurdi eg, hvat hatta var fyri nakað. Jú, hatta var at taka 8 mm film við. Eg spurdi, um eg ikki kundi læna hann. Jú, tað var gaman í, tí tey gjørdu einki við tað. Eg mundi hava tað tólið í fleiri ár, áðrenn eg frætti um eitt størri 16 mm filmstól, ið eg so keypti mær, greiðir Jákup Andreas frá.

Sum áður nevnt vant áhugin fyri filmi seg skjótt til eitt umfatandi arbeiði við at gera heilar filmar saman við filmsvinmanninum Dánjal Jákupi Mortensen.

*Hvør var drívmegin aftanfyri hetta umfatandi filmsarbeiði?*

– Eg dugi ikki ordiliga at siga tær, hvør drívmegin var – tað var bara nakað, sum lá í okkum, sigur Jákup Andreas, ið alt fyri eitt verður stuðlaður av konuni Solveig.

– Tað var tað at skapa, ið var drívmegin, haldi eg. Teir ferðaðust eisini kring oyggjarnar og vístu filmarnar fram í skúlum. So bleiv tað sligið upp í bygdini, og alt, ið kundi ganga, møtti upp. Fólk vóru veruliga bergtikin og glað fyri at síggja tað, ið teir høvdu tikið upp av gerandislívinum í Føroyum. Tað var jú sera óvanligt tá, útgreinar Solveig.

Tá Jákup Andreas hevur hugsað eitt sindur um spurningin, ásannar hann, at tað hevur verið umráðandi fyri hann at dokumentera gamlar føroyskar siðvenjur. Undir krígnum flutti hann nevniliga saman við familjuni til Húsavíkar at búgva, og tað hevði eitt varandi árin á unga Jákup Andreas. Fleiri av hansara filmum eru upptiknir í Húsavík og snúgva seg um bygdar- og bóndalívið.

– Meðan vit búðu í Húsavík, vóru fýra sornhús í bygdini. Í 1959 var bara eitt eftir, og tað var sera óvíst, hvussu leingið fólk fóru at halda fram við at velta korn. Tá ið onkur ringdi til mín og segði, at nú vóru teir í holt við at skera akurin, ið væl kundi verða tann síðsti í Húsavík, leyp eg avstað við filmsapparatinum at filma hesa hendingina, greiðir Jákup Andreas frá.

### Bergtakandi dygd

Filmurin, ið kom burturúr, er at finna á Føroyskum Søgum undir heitinum »Síðsti kornakurin«.

– Hevur tú verið niðri í kjallaranum og sæð hobbyrúmið? spyr Jákup Andreas brádliga og fer á føtur og vísir niðurundir til hobbyrúmið í kjallaranum. Tað er eyðsæð, at Jákup Andreas egnar seg illa at sita stillur í ov langa tíð í senn.

Ruddiliga og væl røkna hobbyrúmið er eins og ein tíðarlummi. Enn standa gomlu klippiamboðini frammi, allastaðni liggur væl frámerktur ráfilmur og undir borðinum ein snotiligur filmsframvísari, ið sær út sum fyrsta dagin. Hillarnar á tremur við rullum oman á rullum við tí reinasta filmsgulli. Dygdin á filmstilfarinum, ið Jákup Anderas Arge og hansara amatør-filmsvinir framleiddu í















Filmsundangongumenninir Jákup Andreas Arge (hm.) og Dánjal Jákup Mortensen. Teir blivu heiðraðir til frumsýningina av Føroyskum Søgum í Sjónleikarhúsinum 19. september

Mynd: Eyðna Joensen